Býarmyndin broytist:

Flyta bøkurnar á »Káta Hornið«

Bókadeildin skapar meiri lív í miðbýnum og skrivstovudeildin fær munandi betri umstøður, tá Nýggi Bókhandil flytir bøkurnar niðan á Káta Horni.



Olavur Arge, stjóri í Nýggja Bókhandli

Í gjár flutti Nýggi Bókhandil bøkurnar niðan á Káta Hornið (Glade Hjørn). Seinasta árið hevur Nýggi Bókhandil viðkað um rúmdina á Káta Horninum, so Bókhandilin hevur nú eina gólvvídd uppá 100 fermetrar. Handilin á »Káta Horninum« verður framyvir bókhandil burturav, tí pappírsvørurnar vera eftir í Sverrisgøtu 9.

Alt til skrivstovuna — úr sama húsi

Skrivstovudeildin er nú flutt teir 20 metrarnar frá »Glade Hjørn« og oman í Sverrisgøtu 9, har Bókadeildin fyrr helt til. Við hesum hevur Nýggi Bókhandil eisini savnað alt til skrivstovuna — frá klipsi til litkopimaskinur — undir sama taki, tí pappírsvørurnar vera framvegis at fáa í Sverrisgøtu 9 og nú eisini dygdarinnbúgvið frá Labofa og vælumtókta skrivstovuútgerðin frá Canon.

Spennandi býarmynd

Onki at ivast í, at tað verður spennandi og hugnaligt at ganga framvið »Káta Horninum« framyvir, tí Nýggi Bókhandil hevur gjørt nógv við hølini hjá bókadeildini.

Innan er alt gjørt av nýggjum og alt innbúgvið er nýtt. Og rúmsáttari er sjálvandi nú, ið rúmini — har Hjalti Skaale, barberur og Haasen, urmakari, fyrr hildu til — eru tikin upp í bókhandilin.

Teir hava borið skjótt at í Nýggja Bókhandli, tí mikudagin, tá latið verður upp á Káta Horninum, eru bert 10 dagar farnir síðan arbeiðið uppá bókhandilin á Horninum byrjaði.

»Blámannavík« á føroyskum

Tvørámaðurin Richard B. Thomsen var í fimtiárunum millum teir mest lisnu rithøvundarnar í Danmark, men nústani kemur bók eftir hann í føroyskari týðing.

Tað er Nýggi Bókhandil, sum gevur »Blámannavík« út, ið Hans Thomsen hevur týtt úr donskum.

Bøkur frá føroyskum rithøvundum vóru sjáldsamar krígskárini. Og um so onkur læt eitt handrit frá sær, so var ringt at geva bøkur út, tí pappír var mest sum ikki til at uppdriva.

Tað var tí sjáldsamur fongur í bókini »Blámannavík«, sum Richard B. Thomsen gav út í 1944. Pappírið hevði hann skaffað úr Reykjavík og Kvívíks Tummas førdi tað heim við »Stellu Argus« ein túrin teir høvdu roynt undir Íslandi.

Stavirnir vóru smáir og vælpakkaðir í bókini, so pappirið skuldi rokka.

Bókin var væl móttikin millum manna í Føroyum tá. Hann skrivaði á donskum, men evnið var so føroyskt sum nakað.

»Blámannavík« var fyrsta skaldsøgan Richard skrivaði. Seinni komu fleiri skaldsøgur frá hansara hond. Einar niggju mundu tær vera í tali tilsamans.

Mest seldur í Danmark

Í Danmark gav forlagið Aschenoug bøkur hansara út eftir kríggið. Og tær vóru so væl umtóktar, at hann fleiri ferðir fekk heitið »månedens forfatter« fyrst í fimtiárunum. Bøkur hansara mundu verða seldar í fleiri enn 100.000 eintøkum í Danmark. Seinni vórðu summar eisini umsettar til enskt, hálendskt og onnur mál við.

Nú verður so høvi at lesa Richard B. Thomsen á føroyskum fyri fyrstu ferð. Frálíku týðingina av skaldsøguni hjá Richard hevur mæti týðari okkara Hans Thomsen greitt úr hondum. Hans hevur týtt fleiri av bókum Richards. Harímillum »Lagnan«, »Riddarahøfn« og »Eydnulandið«, sum allar hava verið lisnar í útvarpinum.

Richard B. Thomsen hevði — um hann livdi — fylt 100 ár 12. februar.

SANDOYAR BÓKHALDSVIRKI

Prentaralærlingur søkist

Fyri ein av kundum okkara søkja vit eftir prentaralærlingi til prentsmiðju í Tórshavn.

Viðkomandi skal hava 9. — 10. flokk.
— helst 18 ár ella eldri
— køn/ur í føroyskari skrift.

P/f Sandoyar Bókhaldsvirki
Tlf. 61 376 - 210 Sandur

Norðoya Javnaðarfelag
Ársaðalfundurin
verður 24. februar
Skrá samb. lógum felagsins.
Tíð og stað verður lýst seinni.

NEVNDIN

Vágs Javnaðarfelag
Aðalfundur
verður ónsdagin 24. februar.
Skrá samb. lógum felagsins. Tíð og stað verður lýst seinni.

NEVNDIN

Skylda ikki uppá hálkuna

heldur fyrireika teg og bilin